# Nýggi stjórin í Norðurlandahúsinum vitjað Klaksvík

**Niels Halm hevur vitjað part av mentanarlívinum í Klaksvík og heldur, at Klaksvík hevur nógv at bjóða á mentanarøkinum**

KLAKSVÍK
*tíðindaskriv*



*Niels Halm stjórin í Norðurlandahúsinum saman við teimum tungu dreingjunum í Klaksvík*

Dávur Winther - mentanarleiðari, sum longur nú hevur havt ávíst samstarv við Niels Halm um m.a. H. C. Andersen Paraden, hevur aðrar og fleiri ætlanir um samstarv við Norðurlandahúsið.

Fyri at kunna um , hvat er á skránni ymiskar staðir í Klaksvík á mentanarøkinum, varð Niels boðin til Klaksvíkar á vitjan.

Mikudagin varð fundur við borgarstjórnan Steinbjørn O. Jacobsen og forkvinnuna í Mentanarnevndini Gunvu við Keldu og umboð fyri mentanarnevndina.

Eisini vóru umboð fyri: Atlantis, kunningarstovuna og Summarfestivalin við á fundinum, har tey kunnaðu um sítt virksemi.

Vitjað var eisini í kirkjuni, skúlanum, Atlantis, Kunningarstovuna og í Studio Pegasus.

Niels var saman við konu síni í Klaksvík. Tey kundu ikka bara sær við at taka ta vøkru náttúruna uppá tungu. Samstundis fegnaðist hann um tað nógva virksemið, sum Klaksvíkin kundi vísa á hevði verið á skránni seinnu árini . Fleiri hugskot komu upp úr teimum ymisku hattunum og vórðu umtalað, sum spennandi.

Ætlanin hjá nýggja stjóranum í Norðurlandahúsinum er samanfallandi við ynski hjá Klaksvík, at so nógv tiltøk sum gjørligt skulu kunna vera aðrastaðni enn bert í Norðurlandahúsinum. Í hesum sambandi helt hann Klaksvík vera eitt spennandi øki.

Niels Halm metti at Klaksvíkin hevði nógv at bjóða, og hann gleddi seg til at eitt frukarmikið samstarv millum Norðurlandahúsið og Klaksvík í síni heild kundi koma í lag.

Eitt vóru allir partar samdir um: Netverkið av persónum, sum knýta seg til mentanarøkið í breiðari merking var umráðandi at halda fast við og styrkja.

# Øll vilja hoyra Brian

**Tað eru ikki bara tey ungu sum vilja hoyra írsku heimsstjørnuna Brian Mc Fadden á Summarfestivalinum. Stórur áhugi er fyri at keypa billettir í forsølu og fólk í øllum aldri royna í hesum døgum at tryggja sær innivist í Norðoyggjum fyrsta vikuskiftið í august**

KONSERT
*Jákup Mørk*



*Longu nú tykjast fólk hava lagt sær ætlanir um at fara til Klaksvíkar í augustmánaði, tá Brian McFadden verður millum teirra, sum síggjast á pallinum*

– Jú, telefonin gongur heit og tað er longu farið at ganga undan við summarhúsum, sigur Christian Olsen, leiðari á Kunningarstovuni í Klaksvík

Síðani fyriskipararnir av Summarfestivalinum kunngjørdu, at ongin minni enn navnframi forsangarin í Westlife, Brian McFadden, sum í hesum døgum klívu hitlistarnar í nógvan londum, verður í Klaksvík fríggjakvøldið 5. august, hava tey á Kunningarstovuni havt úr at gera.

– Áhugin er sera stórur fyri at tryggja sær innivist meðan festivalurin er og at fáa fatur í atgongumerkjum. Vit hava í løtuni eitt avmarkað tal av húsum og íbúðum, og hesi tilboðini eru longu um at ganga undan. Men vit royna tó at útvega fleiri hús, men tað kann verða trupult at herberga øllum, tí flestu klaksvíksingar vilja eisini verða heima meðan stóru tónleikatiltøkini vera.

### Bót og biti

Seinasta summar vóru fleiri festivalgestir sum valdu at taka tjaldið við sær til Klaksvíkar. Og soleiðis verður eisini hetta summarið væntar Christian Olsen á Kunningarstovuni.

– Vit hava góðar umstøður til teirra, sum vilja reisa tjald og búgva í tjaldingarplássini úti í Grøv. Ein avtala er eisini gjørd við ein bónda, soleiðis at gerst tað neyðugt, so verður pláss fyri eini 100 teltum tilsamans.

Harfturat er møguleiki hjá fólki at koma við campingvognum, at stevna til Klaksvíkar við báti ella at fáa innivist hjá privatfólki. Ból og biti er eitt tilboð, har gestir verða vístir til eitt kamar við morgunmati inni hjá fólkum, sum í húsum sínum hava pláss til yvirs.

### Innrás av fólki

Steintór Rasmussen, sum er ein av fyriskiparunum av Summarfestivalinum, roknar við, at tað verður ein innrás av fólki longu fríggjakvøldið, tá ið Brian Mc Fadden fer á pallin.

– Vit hava síðani seinasta summar merkt sera stóran áhuga fyri festivalinum. Men aftaná at vit kunngjørdu, at írska heimsstjørna fór at verða at hoyra í Klaksvík tykist tað um fólk í øllum aldursbólkum og allastaðni úr landinum ætla sær á summarfestival. Og tað teknar væl at tað longu eru seld fleiri hundrað vikuskiftispass í forsølu, sigur Steintór Rasmussen, sum væntar at tey bíligu atgongumerkini eru uppi, áðrenn tað føroyska summarið av álvara byrjar.

# Heimasíða til handverk

**Føroya Handverkarafelag fingið heimasíðu**

HEIMASÍÐA
*Tíðindaskriv*

Á heimasíðuni eru upplýsingar um felagið og limafeløgini. Kunnað verður eisini um virksemi, fundir, tiltøk og onnur viðurskifti, sum viðkoma felagnum og handverksvinnuni.

Eisini eru tíðindi og tíðindastubbar á heimasíðuni. Talan er um tíðindi, sum lýsa støðuna í handverksvinnuni og um annað, sum kann hava týdning fyri hesa vinnu.

Á heimasíðuni eru nógv leinki til feløg, sum Handverkarafelagið hevur samband við, og til skúlar og stovnar, sum standa handverksvinnuni nær. Vitjandi á heimasíðuni hava eisini høvi til at lesa sáttmálar og lønartalvur, sum Handverkarafelagið hevur gjørt við arbeiðsgevarafeløgini.

Adressan á heimasíðuni er www.fhf.fo

# Forvitnislig konsert í hábærsligum umhvørv

TÍÐINDASKRIV
*frá Føroya Fornminnissavni og Tórshavnar Kamarkóri*

Sunnudagin 6. mars kl. 16.00 hevur Tórshavnar kamarkór konsert í framsýningarhølunum, har kirkjubøstólarnir verða sýndir fram.

Hugskotið við konsertini er at framføra kirkjutónleik, sum hóskar til so hábærsligar karmar, sum kirkjubøstólarnir eru.

Tónleikurin, sum Kamarkórið fer at framføra, er valdur soleiðis, at hann onkusvegna hevur tilknýti til myndaevnini á stólavangunum ella ta tíðina, teir eru frá.

Rættiliga nógvur kórtónleikur snýr seg um Mariu moy (Ave Maria, Ave maris stella, Maria var moyggin o.s.fr.), og av tí at sunnudagurin 13. mars er Boðanardagur Mariu, og at Maria er umboðað á 2 av stólavangunum, eru heilir 4 sangir til hennara á skránni. Myndaevnið á fremsta stólinum, sum kallast Visitatio - Vitjanin -, har Maria kemur at vitja Elisabet, sum eisini er við barn, er beinleiðis umboðað við sanginum við sama heiti.

Á skránni annars er kórsangir úr miðøld, úr renesansuni, romantiska tíðarskeiðnum, 2 kingoløg og nýggjur føroyskur kórtónleikur.

Ein blásikvintett, mannað av lærarum í musikkskúlanum, luttekur eisini í konsertini við tónleiki eftir J.S.Bach, Percy Grainger og Darius Milhaud.

Annars er at siga, at Tórshavnar Kamarkór, sum Ólavur Jøkladal setti á stovn í 1985, hevur 20 ár á baki í ár, og verður hetta hátíðarhildið við jubileumskonsert í Norðurlandahúsinum 30. apríl.

Kári Bæk er leiðari hjá Tórshavnar Kamarkóri.

Í steðginum verður stutt frágreiðing um motivini á kirkjubøstólunum.

Atgongumerki á 70 kr. verða seld við dyrnar, og børn hava ókeypis atgongd.

# Amnesty til kvinnur

TÍÐINDASKRIV

Í sambandi við Altjóða kvinnudagin 8. mars fer Amnesty International Føroya deild at skipa fyri tiltøkum undir heitinum "Steðgið harðskapi móti kvinnum". Tiltøkini eru partur av altjóða átakinum hjá Amnesty "Stop violence against women".

Fyrra tiltakið verður á Torginum í SMS , har Amnesty hevur eina framsýning og sølubás allan dagin.

Umframt framsýningina og tiltakið við handmerkjunum er møguleiki hjá fólki at skriva undir áheitanir til stjórnir, um at streingja á fyri at gera mannarættindi til veruleika fyri allar kvinnur.

Seinna tiltakið verður í hølunum hjá Arbeiðarafelagnum Hæddini í Runavík klokkan 20.00. Har fara umboð frá Amnesty at greiða frá um harðskap móti kvinnum og um altjóða átakið "Steðgi harðskapi móti kvinnum", sum Føroya Deild arbeiðir við í løtuni.